## Bardagi í klubbagarðinum

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Leygardagin eftir middag var ein ungur maður fyrst í 20-unum á løgreglustøðini og boðaði frá, at hann hevði verið fyri harðskapi náttina fyri.

Hann greiddi løgregluni frá, at hann fyrst varð sligin í andlitið og síðani sparkaður, meðan hann var liggjandi. Tilburðurin er farin fram í klubbagarðinum leygarmorgunin, tá fleiri persónar fóru til hendurs. Maðurin, sum hevur boðað frá tilburðinum, mátti seymast í andlitinum, tí hann hevði fingið eina fliku.

Løgreglan hevur enn ikki skuldsett nakran fyri tilburðin, men hon arbeiðir við málinum. Óvist er tí, hvør persónur hevur framt harðskapin, og hvussu tilburðurin er farin fram.

## Fallhjálmur bjargaði

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*

Uttan fallhjálm hevði ein ungur drongur óivað fingið álvarsligan skaða, tá hann leygarmorgunin datt á skutara sínum.

Drongurin koyrir á V.U. Hammershaimbsgøtu, tá hann stoytir á ein parkeraðan bil. Drongurin dettur og langar høvdið í bilin. Drongurin fekk skursl í andlitið, men tað var fallhjálmurin, sum bjargaði honum í hesum førinum.

## Friðarlig jóansøka

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Suðuroy hevur ikki havt meira at gera enn vant, hóast nógv fólk hevur verið á jóansøku í Vági um vikuskiftið.

Tveir mans hava sovið rúsin av í klivanum, og løgreglan steðgaði tveimum bilførarum, sum vórðu tiknir við á støðina at geva blóðroynd, tí løgreglan metti, at teir høvdu koyrt ávirkaðir.

Løgreglustøðin hevði annars fingið fólk úr øðrum oyggjum at hjálpa sær at halda skil á stevnuni, men hetta vísti seg ikki at vera neyðugt á hesum sinni. Ein óvanliga friðarliga jóansøka, hóast veðrið var av tí besta allar dagarnar, sigur vakthavandi á Tvøroyri.

## Einki ILA í Árnafirði

ILA
*Stefan í Skorini*

Alibrúkið í Árnafirði er ikki rakt av ILA hóast alt. Sterkur illgruni var annars um ILA í fyrrverandi alibrúkinum hjá Hellisvað, sum Vestlax og Havsbrún nú hava keypt.

Hetta vísir seg tó ikki at vera rætt. Gjøllari kanningar av royndunum vísa, at talan ikki var um ILA-smittuna. Hetta sigur Peter S. Østergaard á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Tó er BKD-smittan staðfest á fjørðinum.




# ILA í Haraldssundi



*Alibrúkið hjá Faroe Salmon í Haraldssundi er rakt av ILA, váttar Heilsufrøðiliga Starvsstovan. Talan er um smolt í ringunum, og tí er fíggjarligi missurin størri*

*Savnsmynd*

**ILA hevur rakt Faroe Salmon í Klaksvík sera meint. Nú er tað staðfest, at triðja alibrúkið hjá felagnum hevur fingið ILA**

ILA
*Stefan í Skorini*

Faroe Salmon fekk mánamorgunin tey tungu boðini frá Peter S. Østergaard, leiðara á Fiskasjúkudeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, at alibrúkið í Haraldssundi er rakt av ILA.

Royndir vórðu tiknar í ringunum í síðstu viku, og tær eru kannaðar bæði í Føroyum og í Danmark, og allar royndirnar vóru positivar.

Í sambandi við staðfestingar av smittuni fer landsstýrið at steingja økið fyri at forða fyri, at smittan breiðir seg enn meira. Óviðkomandi skip og bátar skulu halda seg í minsta lagi 500 metrar burtur frá alibrúkinum í Haraldssundi.

Hetta er tað triðja alibrúkið hjá Faroe Salmon, sum nú er rakt av ILA, og tað er óivað ein dyggur smeitur hjá fyritøkuni. Fyrst var tað alibrúkið í Hvannasundi og síðani alibrúkið við Kunoyarnes. Nú er tað so alibrúkið í Haraldssundi, sum er rakt av herviligu smittuni.

Peter S. Østergaard váttar, at talan er um smolt, sum er í ringunum, og tá er fíggjarligi missurin mundandi størri, enn um talan var um størri fisk.

Sosialurin gjørdi fleiri royndir at fáa fatur á Jón Purkhús, stjóra í Faroe Salmon, eftir at Peter S. Østergaard hevði váttað tíðindini, men hetta eydnaðist tíverri ikki.

# Makrel á íslendskari útgávu

**Føroyski bólkurin Makrel hevur fingið eitt lag við á eina íslendska fløgu, sum júst er útgivin. Lagið er tikið upp á eini konsert, sum bólkurin var við á í Reykjavík**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Talan er um eina savnsfløgu við nítjan løgum, sum eru spæld av ymiskum íslendskum bólkum. Makrel er einasti útlendski bólkurin á fløguni. Fløgan verður nevnd Dordingull.com, og vørumerkið er tungur rokktónleikur.

Lagið hjá Makrel, sum er á fløguni, varð tikið upp á eini konsert í Íslandi. Konsertin var í einum ungdómshúsi í Reykjavík, og manningin varð tá spurd, um vildi vera við á hesi útgávuni. Konsertin var dagin eftir, at bólkurin hevði spælt í kappingini Músíktilraunir 2002, sum er tað sama sum Prix Føroyar, greiðir Rasmus Rasmussen, gittarleikari, frá. Lagið verður nevnt "Mítt ljós", og hetta er einasta lagið á fløguni, sum ikki kann bólkast sum heavy metal.

Hetta er fyrstu ferð, at ein før-oyskur bólkur er við á eini íslendskari fløgu. Tutl hevur áður givið út eina fløgu við íslendskum og føroyskum bólkum.

Hetta er samstundis fyrsta lagið hjá bólkinum Makrel, sum er við á eini útgávu





# Omman úr Koltri, abbin úr Skopun

**Í Rabarhúsi í Fuglafirði sýnir íslendingurin, Bjarni Joensen, fram 27 oljumálningar, sum lýsa stórbaru náttúruna í Íslandi**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*

Maðurin hevur búð í Vestmannaoyggjunum, har konan er fødd; nú búgva tey í Torlakshøfn. Ein sonur, Omar Joensen, er giftur í Føroyum; hann býr saman við føroysku konu síni á Kambsdali.

Bjarni hevur røtur í Føroyum; abbin, Johannes Joensen, var úr Skopun og omman, Lisa Maria, fødd Jacobsen, var ættað úr Koltri.

Sjálvur sigldi Bjarni við fiski til Føroyar fyri umleið 35 árum síðan við 70 tons trolaranum, Eyjaver. Hetta var mest hýsa og flatfiskur, sum teir løgdu uppí Havn.

Nú Bjarni er í Føroyum og hevur málningaframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði, er konan, Margret, við honum. Tey búgva hjá soninum á Kambsdali, og ætlanin er at steðga í Føroyum í umleið ein mánaða.




*- Hetta er eitt gott og gamalt hús, sum er vælegnað til málningaframsýningar, sigur Bjarni Joensen*

### Náttúrumálningar

Bjarni hevur teknað, síðan hann var smádrongur. Tá ið hann seinni byrjaði at mála, var tað við akryl-máling, men í fleiri ár hevur hann málað við oljumáling.

Hann hevur 27 málningar við sær í Føroyum, og vit kunnu siga, at allir avmynda stórbaru íslendsku náttúruna í øllum sínum vakurleika - og um alt landið, bæði eystanfyri, vestanfyri, sunnanfyri og norðanfyri.

Sjálvur sigur Bjarni, at tveir av málningunum partvís eru abstraktir, men eisini hesir mynda íslendsku náttúruna, soleiðis sum eyguni síggja hana.

Sosialurin vitjaði Bjarna í Ribarhúsi leygardagin. Hann var blíður og fyrikomandi og gav sær góðar stundir at práta og vísa okkum frálíku málningarnar, hann hevði hangandi á vegginum. Eisini bjóðaði hann kaffi.

Málningarnir hjá Bjarna eru litríkir og vakrir, og sigast kann ikki, at hann hongur seg í ávísar litir, men málar íslendsku náttúruna við øllum teimum litum, vakurleika og stórbæri, hon nú einaferð goymir.

Fleiri av málningunum lýsa støð, sum føroyingar kenna, eitt nú Tingvøll og oynna, Surtsey, sum kom undan kavi í selstiárunum. Onkur málningur avmyndar eisini kendu innsiglingina til Vestmannaoyggjarnar.

Hóast allir málningarnir avmynda íslendsku náttúruna, bæði uppi og niðri - í stórum eins og í smáum- er hetta ein fjølbroytt framsýning.

Framsýningin í Ribarhúsi er opin til og við 3. juli, men á Varmakeldu verður aftur høvi at síggja ein part av listini hjá Bjarna; tá verða nevniliga 10 av málningunum sýndir fram í skúlanum í Fuglafirði.

### Fyrstu ferð í Føroyum

Hetta er fyrstu ferð, at Bjarni, sum er 66 ára gamal, hevur havt málningaframsýning í Føroyum. Í Íslandi hevur hann havt fleiri framsýningar, og ætlandi skal hann hava eina framsýning í Reykjavík nakað eftir, at hann kemur yvir aftur til Íslands.

Spurdur, um hann kundi hugsað sær at málað føroysk motivir, sigur Bjarni, at hetta hevur hann hugsað um.

- Eg lovi einki, men tað er ikki óhugsandi, at eg fari at mála føroysku náttúruna og møguliga kendar bygningar og síðan hava eina framsýning í Føroyum einaferð seinni.

Nú hann er í Føroyum, ætlar hann sær í Sandoynna at vitja grøvina hjá forfedrum sínum. Har ætlar hann at steðga einar tríggjar dagar, taka myndir og gera skitsur, sum hann møguliga fer at mála, tá ið hann kemur yviraftur.

- Føroyska náttúran er vøkur. Hóast fjøllini og dalarnir her eru minni enn í Íslandi, so er náttúran stórbar, tí alt er so nær.

Í Føroyum hevur Bjarni serliga heft seg við grøna bøin og hagan, sum er tað, ið ferðafólk serliga leggja til merkis í føroysku náttúruni.

Bjarni Joensen er annars væl nøgdur við umstøðurnar í Ribarhúsi.

- Hetta er eitt gott og gamalt hús, sum er vælegnað til framsýningar av hesum slagi, sigur fryntligi íslendingurin, sum seinast var í Føroyum fyri 13 árum síðan.



*Hann málar íslendsku náttúruna - í øllum sínum vakurleika og stórbæri. Alskyns litir og motivir av stórum og smáum í íslendsku náttúruni*


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | |
|---|---|
| **Nissan Micra 1,0 GX** gráur, 5 hurðar, árg. 1999, 27.000 km. | 85.000 |
| **Nissan Micra 1,0** grønur, 3 hurðar, árg. 2000, 27.000 km. | 88.000 |
| **Nissan Almera 2,0 Diesel GX** grønur, 5 hurðar, árg. 1997, 110.000 km. | 110.000 |
| **Nissan Almera 1,6** gráur, 4 hurðar, árg. 1996, 66.000 km. | 75.000 |
| **Nissan Almera 2,0 Diesel GX** reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 119.000 km. | 110.000 |
| **Nissan Sunny 1,6 LX** bláur, 4 hurðar, árg. 1987. | 15.000 |
| **Nissan Primera 2,0 SLX** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 45.000 km. | 105.000 |
| **Nissan King Cab 4x4 DieselTurbo** blágráur, 2 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. | 130.000 |
| **Peugeot 106 Diesel** bláur, 3 hurðar, árg. 1997, 97.000 km. | 66.000 |
| **Peugeot 306 DT 1,9** bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. | 90.000 |
| **Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.** bláur, 4 hurðar, árg. 1994, 230.000 km. | 120.000 |
| **Opel Corsa 1,2** grønur, 3 hurðar, árg. 1996, 40.000 km. | 65.000 |
| **Opel Astra 1,6** bláur, 5 hurðar, árg. 1995, 109.000 km. | 67.000 |
| **Opel Astra 1,6** svartur, 5 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. | 105.000 |
| **Opel Vectra 1,4** hvítur, 4 hurðar, árg. 1990, 255.000 km. | 26.000 |
| **Subaru 1600** hvítur, 4 hurðar, árg. 1989, 140.000 km. | 10.000 |
| **Saab 900 2,0i** bláur, 5 hurðar, árg. 1996, 129.000 km. | 110.000 |
| **Saab 900** reyður, 3 hurðar, | 12.000 |
| **Ford Escort 1,6** gráur, 3 hurðar, árg. 1992, 179.000 km. | 18.000 |
| **Fiat Tipo** grønur, 5 hurðar, árg. 1990, 196.000 km. | 10.000 |

Sosialurin

**Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu ver a seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61